52-057/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 57/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um kærumøguleikar, kæruvegleiðing og kæruviðgerð í avgerðum um kvotuútluting hjá Fiskimálaráðnum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvør skal viðgera kærur frá umsøkjarum um avgerðir Fiskimálaráðsins í sambandi við kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir?
2. Hvørja kæruvegleiðing hava umsøkjarar fingið sambært fyrisitingarlógini, og hava kærarar fingið svar og kunning um, hvussu kærurnar verða viðgjørdar og nær kæruúrskurður kann væntast?
3. Er Fiskimálaráðið gegnigt at viðgera kærur, tá ið landsstýrismaðurin hevur upplýst, at hann hevur verið uppi í málsviðgerðini og tikið avgerðir, ið ganga ímóti fyrisitingarligum tilmælum?
4. Hvussu hevur løgmaður hildið eftirlit sambært skyldum hansara, við at fyrisitingin er farin fram á lógligan og fullgóðan hátt í hesum málum?

Svar:

Til spurning 1:

Málið sum er til viðgerðar hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum er um at tilluta kvotur sbr. § 49 í sjófeingislógini til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Ávís kvota er til taks sbr. sjófeingislógini og kunngerðum við heimild í sjófeingislógini. Nógv fleiri umsóknir eru um kvotu enn tær, sum eru tøkar, og tí er tað landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum sum tekur avgerð um, hvør fær kvotu og hvussu nógv. Her hevur landsstýrismaðurin, út frá teimum atlitum sum liggja aftanfyri sjófeingislógina, gjørt av, hvørjir av umsøkjarunum skulu fáa tillutaða kvotu.

Nú verður spurt, um avgerðin hjá landsstýrismanninum, um at tilluta til ávísar umsøkjarar og at nokta øðrum, kann kærast.

Her má svarið býtast í tvey.

Spurningurin um innihaldsliga at fáa tillutingina viðgjørda av nýggjum má viðgerast fyri seg.

Spurningurin um persónligar avleiðingar av, at landsstýrismaður, ella embætismaður hansara, møguliga hevur borið seg ólógliga at, má viðgerast fyri seg.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Innihaldsliga kann tillutingaravgerðin ikki kærast sbr. sjófeingislógini. Hon er tikin av landsstýrismanninum. Summi hava fingið játtandi svar, onnur noktandi. Tey sum hava fingið tillutað kvotu, hava fingið tað, sum danir kalla eina "begunstigende forvaltningsakt". Hon kann ikki takast aftur, uttan so at tað ber til at vísa á heilt serstøk og óvanlig viðurskifti, sum eisini kunnu lastast umsøkjarum, sum hava fingið kvotuna.

Er feilur gjørdur í viðgerðini, sum gjørdi, at ein, sum fekk noktandi svar, av røttum átti at fingið kvotu, kann landsstýrismaðurin ikki rætta uppá avgerðina við at geva honum kvotu. Hann kann ikki fara upp um kvotuloftið sum lóggávan ásetur. Í hesum føri er bert ein máti at loysa trupulleikan. Tann sum heldur, at hann av órøttum ikki fekk kvotu, má gera sítt tap upp og stevna Fiskimálaráðnum eftir upphæddini.

Um landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum fær áheitan um at taka kvotutillutingina uppaftur til nýggja viðgerð, so ber altíð til at byrja slíkt uppafturtøkumál. Men, sbr. tí, sum her er nevnt, er landsstýrismaðurin sera bundin í uppafturtøkumálinum. Hann fær illa tikið aðra støðu, enn hann longu hevur tikið.

Um persónligar avleiðingar fyri landsstýrismannin, ella embætismann, av skeivum gerðum er at siga:

Landsstýrismaðurin er undir politiskari og rættarligari ábyrgd.

Tað er løgmaður, ella ein meiriluti av øllum tingmonnum, sum hevur heimildina at gera av, um landsstýrismaðurin politiskt hevur borið seg so jánkasliga at í tillutanini av kvotum, at hann eigur at verða frásettur.

Um landsstýrismaðurin hevur borið seg at ólógliga, og tí eigur at verða ákærdur við eitt nevningating við kravi um revsing ella endurgjald, er ein avgerð, bara løgtingið kann taka. Vanliga byrja slík mál í løgtinginum við eini umboðsmannaniðurstøðu ella landsstýrismannaniðurstøðu. Er hereftir rímilig grund at halda at lógabrot er framt verður farið víðari til kanningarstjórakanning.

Agamál móti aðalstjóranum í fiskimálaráðnum, tekur løgmaður sær av. Agamál móti starvsfólkum í fiskimálaráðnum tekur aðalstjórin sær av.

Til spurning 2:

Sbr. fyrisitingarlógini § 24, stk. 1, skulu avgerðir, sum kunnu kærast til annan fyrisitingarmyndugleika, hava vegleiðing um kærumøguleika. Í ítøkiliga málinum er ongin kærumøguleiki.

Fiskimálaráðið sigur soleiðis um spurningin:

> *Umsøkjarar hava onga kæruvegleiðing fingið í sambandi við avgerðirnar. Orsøkin er, at sambært fyrisitingarlógini er ikki skylda at vegleiða um, at mál ikki kunnu leggjast fyri annan fyrisitingarmyndugleika. Tá ongin lógarásett freist er at leggja málini fyri dómstólarnar, er heldur ikki skylda at upplýsa um, at málini kunnu leggjast fyri dómstólarnar. Vanliga verður heldur ikki upplýst, um kærumøguleikan til Løgtingsins Umboðsmann, uttan so serligar grundir eru til tess. Ráðið hevur ikki mett tað verða neyðugt at vegleiða um møguleikar at leggja málið fyri aðrar instansir í fyrstu syftu.*
>
> *Í avgerðunum í eftirfylgjandi kærumálum, sum verða viðgjørd sum umbønir um uppafturtøku, verður tó upplýst um, at avgerðirnar eru endaligar innan fyrisitingina og kunnu leggjast fyri Føroya Rætt til støðutakan.*
>
> *Viðvíkjandi móttøkuváttan og kunning um viðgerð hevur Ráðið móttikið seks kærur í tíðarskeiðinum 21. til 24. september. Váttan um móttøku er send øllum 5. oktober, og samstundis er upplýst, at málini verða viðgjørd og avgerð*

verður send skjótast gjørligt. Avgerð er tikin og send í tveimum málum tann 13. oktober. Avgerðirnar í hinum fýra málunum verða væntandi sendar miðskeiðis í hesi vikuni. Vit kunna um, tá hesar eru sendar.

Til spurning 3:

Tekniskt sæð er ikki talan um kæru til ein kærustovn, men ein umbøn til ein stovn um uppafturtøku. Tveyinstans inhabilitetur kemur fyri, tá ið krav er um óhefta viðgerð á tveimum stigum. Ein uppafturtøkumyndugleiki gerst ongantíð inhabilur at viðgera málið enn einaferð.

Til spurning 4:

Vit hava í Føroyum eina ministeriala skipan. Sbr. stýrisskipanarlógini § 33 stk. 1 situr hvør landsstýrismaður fyri málsøkjum sínum hvør sær. Eftir stk. 3 hevur Løgmaður eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

Í verki er tað tí so, at landsstýrismenninir taka avgerðirnar. Løgmaður yvirmetir tær ikki, men kemur bara inn í málið um onkur ábending er um, at landsstýrismaður er í holt við nakað, sum ikki hevur politiska undirtøku í samgonguni, ella sum er ólógligt.

Sjálvsagt væntar løgmaður at landsstýrismenn fyrisita lógliga, og eftirlitsmál verður ikki tikið upp, uttan so at greið ábending er um at okkurt greitt ólógligt fer fram.

Í málinum um tillutan av kvotum eru umsøkjarar ónøgdir við avgerðina, men onki er framkomið í málinum, sum bendir á, at ólógliga er atborið, og tí er einki eftirlitsmál tikið upp.

Í Tinganesi, 26 oktober 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður